## DAGSINS MEINING

# Týskaland – Føroyar

Stór var frøin, tá Føroyar komu í sama bólk sum Týskaland í EM-undankappingini í fótbólti. Hóast Føroyar hava spælt móti mætum fótbóltstjóðum er tað ongantíð eydnast at koma í bólk saman við eini av størstu fótbóltstjóðunum sum t.d. Bretlandi, Italia og Týskalandi. Hesaferð eydnaðist tað so og fall lutakastið á fleirfaldaða heimmeistaran Týskaland. Tað hevur elvt til bjartskygni ikki minst hjá teimum, sum virka innan ferðavinnuna. Tí nú var bráddliga góður møguleiki at fáa "ókeypis" reklamu á stóra týska marknaðinum fyri Føroyum sum ferða-mannalandi. Hvussu og ikki – nú sær bráddliga út til, at væleydnaða lutakastið kann gerast ein succes av aðrari verð hugsa vit um at gera Føroyar uppaftur meira kendar í ikki bert Týskalandi men í øllum altjóða fótbóltsheiminum.

Tað hevur nevniliga eydnast týska landsliðnum – ið Føroyar skulu spæla móti í oktober!!! – at spæla seg í finaluna í HM-kappingini. Hetta merkir, at Føroyar, pinkulandið í altjóða fótbóltshøpi, kemur at møta ikki bert fótbóltsrisanum Týskalandi men einum feskum finalisti frá HM. Og vil heilt væl til – um ein kann loyva sær at siga tað so – kunnu vit koma at spæla móti sjálvum heimsmeistarunum úr Týskalandi. Tí landið hevur avgjørt møguleika fyri at gerast heimsmeistari.

Hetta letur upp fyri ótrúligum fyri ikki at siga fantastiskum perspektivum fyri ikki bert føroyskan fótbólt men fyri Føroyum sum ferðamannalandi, fyri Føroyum sum pinkutjóð, fyri Føroyum fyri tess máli og mentan, fyri føroyskum vørum, ja rætt og slætt fyri tilveru okkara her mitt úti í Atlantshavi.

At skula møta heimsmeistarunum ella tí eina finalistinum í HM-kappingini í komandi EM-undankapping er einki minni enn eitt undur. Og bera vit okkum rætt og skilagott at, verður tað besta høvi nakrantíð at gera umheimin varugan við Føroyar.

So er spurningurin um vit duga at brúka henda framúr møguleika. Sjálvandi er bara tað at skula spæla móti Týskalandi í sær sjálvum nakað einastandandi. Men eisini at fáa eitt heiðurligt úrslit – vil vera juvelurin í krúnuni. Tí mugu allar kreftir setast inn á at brynja okkara landslið til aldarinnar fótbóltsdyst. Ímyndið okkum ein 1-0 sigur við Toda sum málskjútta!!! Pinkutjóðin Føroyar vinnur á heimsmeistarunum. Nú nú, vil onkur siga. Haldið høvdið kalt. Tað kann eins væl enda við 10-0 tapi. Jú, so er. Men vit hava nú fingið høvið, og tí eigur alt at verða gjørt til tess at menna landsliðið til dystin móti Týskalandi. Aðrastaðni hevði øll manningin verið frítikin frá arbeiði uppá landsins rokning. So nógv kunnu fótbóltsspælarar týða fyri landið uppá longri sikt. Alt fyri eitt eiga boð at verða eftir Toda, sum má og skal vera við til henda dystin. Kosta hvat tað kosta vil. Megna vit ikki at standa saman fyri at fremja hesa søk, tá megna vit einki. Landsstýrismaðurin í ítróttarmálum, løgmaður og ferðavinnuráðharrin eiga allir sum ein at taka hetta mál upp á fyrst komandi landsstýrisfundi við einum endamáli: landsliðið á serstaka konto á eini eykafíggjarlóg, so manningin sleppur at venja intensivt frá nú av uppá landsins rokning. Ein skilaíløga í framtíðina. Gloymið ikki Senegal.

**Sosialurin**

# Fram og Vestmenningur roktúr



*Fram og Vestmenningur landaðu góð 300.000 pund í Vestmanna í gjár*

### Fiskaðu góð 300.000 pund av upsa í 8 dagar

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Partrolararnir, Fram og Vestmenningur, hava gjørt ein roktúr.

Teir landaðu góð 300.000 pund í Vestmanna í gjár eftir at hava roynt í 8 dagar.

Á Fiskavirking í Vestmanna vita tey at siga, at skipini hava roynt eystanfyri og vestanfyri Suðuroynna. Eini 95% av veiðini er upsi.

**Grønanes í dag**

Ætlandi landar Grønanes í Vestmanna í dag. Hvussu nógv, teir hava inni, vistu tey ikki, tá ið vit frættu fyrrapartin í gjár.

Hetta er seinasti túrurin hjá Grønanesi, áðrenn skipið fyri til klassingar í Danmark. Grønanes verður helst úr vinnu einar 6-7 vikur.

Vesturtúgvan, sum trolar saman við Grønanesi, fer eisini á beding, nú "makkarin" fer til Danmarkar.

## VIÐMERKINGAR

# Bygdafólkið og samferðslan

**Hans Birgir Hansen/ Mr. Big**

Tórshavn/miðstaðarøkið vil altíð koma at breyðføða og klæða bygdafólkið, ið ferðast morgun og kvøld til og frá Havnini/miðstaðarøkið, hvat øll tit skulu ásanna.

Tað kemst av tí kommunal/landspolitikarar frá 70 árunum ikki hava sýnt bygdar/býar økismenning/útjaðarapolitik stóran áhuga, tí eiga vit lívið í bygdafólki.

Vit skulu skipa so fyri, at høvuðsmiðfyrisitingar vera í Havn/miðstarøkið og leggja partar av almanna/landsprivatu fyrisitingum úti í útoyggjum. Tað er neyðugt at fáa skunda undir kommunalu/landspolitikarar, ið eru valdir at tæna fólkinum, og ikki øvugt, skilja øll tit bygdarfólk tað uttan fyri Havnina.

Vit skulu skapa fortreytir/grundarlag fyri tí greiða býti, ið skal fremjast millum almamma/landið/kommunur/privata, so alt bygdarfólki kann flyta úr Havnini.

Tað skal komast valdsmiðsavnan av øllum avgerðarrættindum í Havnini/miðstaðarøki til lívs við skipa valdsmiðspjaðing, í øllum tí rikna landspolitikinum. Vit skulu miðspjaða framleiðsluvirksemi/flutnings/tænastuvinur/ídnaðin/landbúnaði/hægri skúlar/lærustovnar/barnaansing/eldrarøkt/mentan/list.

Tað skal skipast fyri, at samferðsluruðuleikin verður greiddur í Havnini áðrenn nýggi Smyril og nýggja Norrøna byrja sigling - ein vil gera nógv greitt.

Eg haldi, at lands/kommunalu myndugleikar skulu fáa játtan til at breiðka/styrkja vegin frá Søldarfirði til Lambareiði, og fáa avskipingarhavn í Runavík. Tað kann tá skipast fyri at farma/ferðafólka- og fiskaflutningur fer umvegins avskipingarhavn í Runavík, sum fær týdning fyri alt handils- og vinnuligt virksemi.

Eg kundi hugsa mær farmaskip og nýggja Norrøna nýttu avskipingarhavn í Runavík, Ið vil lætta trýstið úr Eysturoy til Havnar ígjøgnum Norðurstreymoy.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



# Føroyakvøld í Kappróðrarneystinum á Glyvrum

SUMMARTILTØK
*Vilmund Jacobsen*



*Føroyakvøld verður í Kappróðrarneystinum á Glyvrum fríggjakvøldið.*

*Mynd: Vilmund Jacobsen.*

Aftur í ár skipar ferðavinnan í Eysturoy fyri føroyakvøldum í oynni.

- Ætlanin er at skipa fyri eini 8-10 kvøldum ymsastaðni í oynni. Hesi kvøldini verða fjølbroytt og ikki eins á ymisku støðunum.

Kunningarstovurnar siga, at føroyakvøldini eru ætlað bæði okkara summargestum og føroyingum.

**Á Selatrað**

Fyrsta kvøldið av hesum slagi í summar var um vikuskiftið í Skótadeplinum á Selatrað.

- Hetta kvøldið var í fyrsta lagi ætlað teimum, ið gistu á deplinum og øðrum ferðafólki.

Kunningarstovurnar siga, at næsta tiltak í røðini verður komandi fríggjakvøld, 28. juni kl. 19.30, og hesaferð verður Kappróðrarneystið á Glyvrum karmur um føroyakvøldið.

Ymiskt spennandi verður á skránni, og borðreitt verður við góðum føroyskum mati og fjølbroyttum undirhaldi.

- Undirhaldið kemur at lýsa bæði gamla og nýggja føroyska mentan, siga kunningarstovurnar og leggja aftrat, at føroyskt framleiddar vørur eisini verða til keyps á kvøldinum.

**Atgongumerkir**

Atgongumerkir til føroyakvøldið eru at fáa á kunningarstovunum í Eysturoynni og á Hotel Runavík, sum er sjómansheimið.

- Øll eru vælkomin at seta seg í samband við kunningarstovurnar fyri at fáa meira at vita um føroyakvøldini, sigur ferðavinnan í Eysturoy.

# Lítið fiskaarbeiði í Sandoynni

**- Eysturbúgvin, sum plagar at landa á Sandi, er farin á gullaksaveiði, og tað merkist týðiliga á virkjunum, sigur Magnus Jespersen, stjóri á Sandoy Seafood.**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*



*Ymiskar ábøtur skulu gerast á virkjunum á Sandi og í Skopun, meðan arbeiðsfólkið heldur summarfrí í tvær vikur eftir ólavsøku.*

Seinastu tíðina hevur lítið fiskaarbeiði verið á virkjunum hjá Sandoy Seafood á Sandi og í Skopun.

Hesa vikuna er turt gólv á Sandi, men í Skopun verða einir tveir arbeiðsdagar.

Magnus Jespersen, stjóri á Sandoy Seafood, sigur, at minni fiskur kemur uppá land beint nú, og tí er útboðið av fiski eisini minni.

- Haraftrat kemur, at Eysturbúgvin, sum plagar at landa á Sandi, er farin á gullaksaveiði, og tað merkist týðiliga á virkjunum.

Stjórin roknar við, at Eysturbúgvin verður á gullaksi til einaferð síðst í august; tá plaga teir at fara aftur á vanliga ísfiskaveiði.

Annars ljóðar, at prísurin á gullaksi er góður í summar, og tí kann hugsast, at skipini verða drúgv á gulllaksinum í heyst, um veðrið verður nøkulunda, og gullaksur verður at fáa.

Lítil og eingin útróður hevur verið á Sandi í seinastuni, tí tað hevur viðrað so illa, at ikki hevur verið roynandi hjá bátunum.

**Frí tvær vikur**

Á Sandoy Seafood fara tey í felags summarfrí í viku 31 og 32; hetta eru vikurnar beint eftir ólavsøku.

Magnus Jespersen sigur, at ætlanin er at fremja ymiskar ábøtur á báðum virkjunum, meðan arbeiðsfólkið heldur frí.

- Hetta er stórt sæð vanligt viðlíkahald á báðum virkjunum, sum liggur á láni, sigur hann.

Hesa vikuna hevur eingin landing verið á Sandi, men Sandoy Seafood hevur keypt nakað av fiski á Fiskamarknaðinum, og tað er hendan fiskin, tey hava arbeitt í Skopun.

GÓÐIR BRÚKTIR BILAR

**Nissan Micra 1,0**
grønur, 3 hurðar,
árg. 2000, 27.000 km.
**88.000**

**Nissan Almera 2,0 Diesel GX**
grønur, 5 hurðar,
árg. 1997, 110.000 km.
**110.000**

**Nissan Almera 2,0 Diesel GX**
reyður, 4 hurðar,
árg. 1998, 119.000 km.
**110.000**

**Nissan Primera 2,0 SLX**
hvítur, 4 hurðar,
árg. 1997, 45.000 km.
**105.000**

**Nissan King Cab 4x4 DieselTurbo**
blágráur, 2 hurðar,
árg. 1998, 55.000 km.
**130.000**

**Peugeot 306 DT 1,9**
bláur, 4 hurðar,
árg. 1997, 150.000 km.
**90.000**

**Peugeot 605 SRDT 2,1 Aut.**
bláur, 4 hurðar,
árg. 1994, 230.000 km.
**120.000**

**Opel Corsa 1,2S**
reyður, 5 hurðar,
árg. 1990, 120.000 km.
**10.000**

**Opel Astra 1,6**
bláur, 5 hurðar,
árg. 1995, 109.000 km.
**67.000**

**Opel Astra 1,6**
svartur, 5 hurðar,
árg. 1998, 55.000 km.
**105.000**

**Opel Vectra 1,4**
hvítur, 4 hurðar,
árg. 1990, 255.000 km.
**26.000**

**Opel Vectra 2,0 Di**
bláur, 4 hurðar,
árg. 1998, 96.000 km.
**130.000**

**Subaru 1600**
hvítur, 4 hurðar,
árg. 1989, 104.000 km.
**10.000**

**Saab 900**
reyður, 3 hurðar,
**12.000**

**Saab 900 S**
reyður, 5 hurðar,
árg. 1995, 119.000 km.
**98.000**

**Ford Escort 1,6**
gráur, 3 hurðar,
árg. 1992, 179.000 km.
**18.000**

**Fiat Tipo**
grønur, 5 hurðar,
árg. 1990, 196.000 km.
**10.000**

**Honda Civic 1,4is**
grønur, 3 hurðar,
árg. 1998, 101.000 km.
**99.000**

**Chevrolet Monza**
bláur, 4 hurðar,
árg. 1988, 98.000 km.
**7.000**

**Toyota Land Cruiser 4,2 diesel**
hvítur, 5 hurðar,
árg. 1994, 98.000 km.
**175.000**

Gevið gætur: Bilarnir á listanum kunnu verða seldir
Bilarnir finnast eisini á:
www.nissan.fo

P/F Meinhardt Arge
v/ Oyggjarvegin • Postsmoga 3171
110 Tórshavn • Tel. 31 61 61

Sosialurin